# Makrel í jólagávu

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Ári Rouch sangari í Makrel sigur við planet.fo, at nýggja fløgan verður væntandi í handlunum um jóltíðir, og at enn er einki avgjørt um konsertir í hesum sambandi, men um tað verður so verða tær onkuntíð í 2006.

Ári sigur, at teir eru sera væl nøgdir við upptøkurnar, sum eru gjørdar í Studio Trondheim. Eitt upptøkuhøli í Trondheimi, sum hevur sergrein í rokktónleiki, hip hop og r'n'b. Conor Patrick, sum er hálvur norðmaður og hálvur íri hevur tikið fløguna upp og fer væntandi at ljóðblanda hana.

Makrel hava tikið 12 løg upp og hava enn ikki avgjørt, hvørji skulu á fløguna, løgini eru rættuliga long, og teir velja væntandi eini 9 ella 10 teirra út til útgávu.

Millum løgini eru Forever and Beyond og hini løgini, sum Makrel spældi á Prix Føroyum.

Sum nú er liggja Makrel á fyrsta plássi í kappingini um at gerast vinnari av kappingini Nordic Bands Unsigned, sum MTV og Samsung skipa fyri.

Vinna teir kappingina, verður stakfløgan Forever and Beyond útgivin í øllum Norðanlondum við góðari marknaðarføring. Hetta kann uttan iva hjálpa søluni av nýggju fløguni væl.

Enn ber til at atkvøða á www.nordicunsigned.com

# Boða Guds orð á motorsúkklu

**Í komandi ári verður skipað fyri einum kristiligum Biker-Meet í Føroyum. Í hesum sambandi vitja forsetin í norska Holy Riders og umboð fyri MC-Kirken í Danmark í næstu viku**



GUD OG MC

Í samband við eitt komandi kristiligt »Biker-Meet«, sum á fyrsta sinni verður hildið í Føroyum næsta summar, koma umboð fyri norska motorsúkklufelagsskapin »Holy Riders« og donsku »MC-kirken« at vitja í Føroyum frá 24. til 28 august. Talan er um sjálvan »presidentin« Ole Kristian Kjenes og pressutalsmannin Vidar Johansen, og Per Aagaard Hansen, ið dagliga starvast sum sokallaður MC-prestur í Danmark.

Ætlanin við ferðini er at kanna tey lokalu viðurskiftini her. Tað er fyrstu ferð, at eitt tílíkt tiltak sum »Biker-Meet« verður roynt í Føroyum, so tað ræður um at alt er væl fyriskipað. Endaliga skráin fyri sjálvt tiltakið er ikki løgd enn, men talan verður um nógv ymist áhugavert, ið verður á skránni.

### Stovna »Holy Riders« í Føroyum

Í samband við vitjanina verður skipað fyri at stovna ein »Holy Riders«- motorsúkkluklubb í Føroyum, og Ole Kristian Kjenes verður ráðgevi, tá talan er um viðtøkur o. a., ið skal fáast upp á pláss, har ætlanin eisini er at velja nevnd til felagið. Hesin fundur verður hildin leygardagin, 27. august í »Evangeliihúsinum« í Havn kl. 14.00, har ein og hvør, ið hevur áhuga fyri hesum er hjartaliga vælkomin.

### Framsýning um »Bible for the nations«

Hesin altjóða bíbliufelagsskapurin stendur m. a. fyri útgávuni av "Biker-Bibelen" og mongum øðrum áhugaverdum útgávum. Á møtunum í Kelduni og Evangeliihúsinum verður áhugaverd framsýning at síggja um allar tær ymisku bíbliurnar, ið verða givnar út. Eisini verður nógv at frætta um m.a. »Street-Church« og »Biker-Church«.

### Kom og fá meiri at vita

Ætlanin er, at føroyski almenningurin skal fáa meiri at vita um hesar ætlanir. Tvey møtir verða hildin, annað í »Kelduni«, Skálafjørður, sunnudagin 28. august kl. 11.00 og hitt í »Evangeliihúsinum« í Havn, sunnukvøldið 28, august kl. 18.00.

Øll eru sjálvandi hjartaliga vælkomin, siga fyrireikararnir

veitst tú ikki tað? Sosialurin

KAMPANJUAVSLÁTTUR UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR BILAR




Leiðari av Café Natúr

Ert tú álítandi, ágrýtin og torir at taka ábyrgd, kann tað vera júst tær, ið vit leita eftir. Tú kemur at hava dagligu ábyrgdina av Caféini - eitt arbeiðspláss við nógvum og spennandi avbjóðingum. Talan er um fulltíðarstarv at seta sum skjótast. Løn eftir avtalu.

Send okkum skrivliga umsókn við nøkrum reglum um teg sjálvan og møguligum viðmælum.

Harumframt sóknast vit eftir:

Barrleiðarum
til REX og Eclipse

Barrvørðum, duravørðum og avruddarum
til REX, Eclipse og Café Natúr

REX NIGHT CLUB   eclipse night club   CAFÉ NATÚR

Tinghúsvegur 6 - Boks 3085 - FO-110 Tórshavn - Telefon 211 211 - Teldupostur: rex@rex.fo
www.rex.fo www.eclipse.fo www.natur.fo

LASTBILSFØRARI

Søkt verður eftir førara
til betongpumpubil.
Tann, ið settur verður,
skal verða røkin.

J&K

P/F J & K Betong · Tel 31 50 60 / 58 50 01 / Fax 31 41 94
e-mail JKP@JKP.FO

Sosialurin 341800